# Superman




**Toppskjúttin hjá KÍ, Paul Clapson, var sera fegin, tá ið hann hevði skorað fyri KÍ í Gundadali sunnudagin. Ja, hann var so fegin, at hann tóktist verða flúgvandi eftir málið – ikki undur í at hann skorar so nógv mál...**
Mynd: Álvur Haraldsen

# Landgongd



**Hóast skeltið ger púra greitt, at tað ikki er loyvt at parkera á hesum øki – ja, so ber í øllum førum til at seta ein bát har. Kanska eitt slag av landgongd.**

# Clinton á venjingarlegu



Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton fyrireikar seg í hesum døgum til sína Føroyavitjan í heyst. Clinton var nú um dagarnar sæddur í Buffalo, har vandi seg at vinka til føroyingar. (Mynd: Polfoto)

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Er tað so ein semja?**
Tingmenn í samgonguni eru ikki samdir um semjuna
Sosialurin

**Undirhald á grunnunum**
Spøl til tosk, laks og síl
Lýsing frá Dynema.fo

**Friðargonga omanaftur?**
Rennikapping niðan á Sornfelli
Sosialurin

**Hvat?**
Fortreytir fyri føroyskum ES limaskapi eigur at brúkast politisk orka uppá í nógv størri mun..
Yvirskrift í lesarabrævi

**Heim at taka myndir av seyði**
Hann hevur altíð havt áhuga fyri seyði, og hevur umleið 3000 myndir av seyði heima.
Dimmalætting

**Greið tala**
Vit arbeiða við ymiskum møguleikum, og vit vænta, at okkurt verður greitt skjótt, men beint í løtuni er eingin endalig avgerð tikin.
Portal.fo

# Leyst og fast um stórt og smátt

**Vit vanliga fólk hava ringt við at skilja politikararnar. Nú skulu vit hava ein fólkaatkvøðu í 2010, um vit fara uppí ES, sum eitt atland, fyri síðani at hava eina fólkaatkvøðu í 2012, um vit skulu verða eitt atland ella ikki? Segði onkur: "Raðfestingar"?**

**Tað er ikki altíð stuttligt at verða politikkari, men nú tað skuldi verða STUTTLIGT bar ikki til!**

**At FS vágar sær at gera slíkt!**

**Skemtisøgur hava sum oftast fleiri poeng, enn politiskar framløgur!**

**Stuttligir, stuttmintir, stutt fjús og STYTTRI valskeið!**

**Nú mugu sandavágsmenn noyðast at RÓSA sær av borgarstjóranum!**

**John William Joensen fær Streymoynna og Eysturoynna (32.000 fólk) at verða "minnilutin" í Føroyum. Ja summi halda seg verða nógv!?**